# Komu í minnuluta í fólkatinginum

**– Vit ætlaðu at fylgja teirri semju, vit høvdu gjørt við Føroyar og Grønland í spurninginum um hvalaveiði, men stjørnin kom í minniluta í spurninginum í fólkatinginum, segði danski forsætismálaráðharrin, Anders Fogh Rasmussen**

RÍKISFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*


*Teir tríggir stjórnarleiðararnir høvdu felags tíðindafund í Tinganesi í morgun*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Stutt fyri døgurða í dag hildu teir tríggir stjórnarleiðararnir í Danmark, Føroyum og Grønlandi tíðindafund úti í Tinganesi.

Tað málið, sum fekk størstu umrøðu, var helst fundurin hjá IWC, har skotið er upp, at stovna nøkur hvalareservatir í Suðuratlantshavi. Tey trý londini í ríkisfelagsskapinum vóru samd um ikki at tak undir við hesum uppskoti, men síðani hendi tað, at danska stjórnin kom í minniluta í hesum málinum.

- Eg vil fegin undirstrika, at Danmark tekur undir við burðardyggari hvalaveiði. Vit halda, at smá samfeløg, sum dríva burðardygga hvalaveiði skulu hava møguleika til tað, segði Anders Fogh Rasmussen.

Hann segði víðari, at teir eisini høvdu ætlað sær at fylgt teirri semju upp, sum londini samdust um, men tá stjórnin í málinum kom í minniluta, mátti hon fylgja viljanum hjá meirilutanum.

Men hann segði eisini, at teir flokkar, sum ikki vildu taka undir við semjuni, sum Danmark, Føroyar og Grønland høvdu gjørt, í stóran mun eru flokkar, sum samstarva við Norðuratlantsbólkin.

Løgmaður nevndi, at eisini danski javnaðarflokkurin hevði gingið ímóti semjuni, og hann segði, at hann ætlaði sær at taka upp samband við bróðurflokkin at tosa um hetta málið.

- Men tað er ikki lætt, tá støða er tikin. Tá er verri at venda aftur, segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Allir tríggir stjórnarleiðararnir vóru kortini samdir um, at hetta hevur verið ein væleydnaður fundur, og serliga túrurin út í Koltur og Hest í gjárkvøldið.

- Tað er ein uppliving, sum vit avgjørt fara at taka heimn við okkum, segði danski forsætismálaráðharrin, Anders Fogh Rasmussen.

Lesið meiri um ríkisfundin í blaðnum í morgin.

# Hugleiðingar um Norðurlandahúsið




*Í teksti og myndum sigur bóklingurin "Nordens Hus på Færøerne" søguna um, hvussu Norðurlandahúsið í Føroyum varð til*

**Í nýggja bóklinginum »Nordens Hus på Færøerne« hevur fyrsti stjórin í Norðurlandahúsinum drúgva hugleiðing um, hvussu húsið varð til fyri 25 árum síðani**

BÓKLINGUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Í sambandi við at Norðurlandahúsið fylti 25 ár herfyri, gevur Norðurlandasamstarvið Norden nú út bóklingurin »Nordens Hus på Færøerne«.

## Søgan um húsið

Ætlanin við bóklinginum er siga søguna um, hví og hvussu Norðurlandahúsið umsíðir varð veruleiki eftir eina 10 ára langa og ofta fløkta mentanarpolitiska tilgongd.

Í drúgvari hugleiðing leitar fyrsti stjórin í húsinum, Steen A. Cold, heilt aftur til 1971, tá Erlendur Patursson á fyrsta sinni skeyt upp at byggja eitt norðurlendskt mentanarhús í Føroyum.

Hugleiðingin hjá Steen A. Cold verður samstundis ein áhugaverd lýsing av skiftandi rákum og mentanarpolitiskum kjakum, sum øll høvdu sína ávirkan á bygginginaav Norðurlandahúsinum, sum vit kenna tað í dag.

Eisini eru hópin av myndum, ið fylgja gongdini frá hugskoti til Norðurlandahúsið lat upp 8. maj í 1983.

Í bóklinginum eru eisini innleiðandi brot, har millum onnur Kristina Háfoss, mentamálaráðharri, og Niels Halm, stjóri í Norðurlandahúsinum, lýsa samfelagsliga leiklutin hjá húsinum fyrr og nú.